Norra kann taka seg úr íslendskum oljuloyvum um tvey ár

Jan Müller

05.10.2013 - 20:08

Oljan.fo

Tað kann verða uppfatað sum dupultmoralur at vera partur í loyvum í íslendskum øki og ikki loyva leiting í norskum øki við Jan Mayen heldur norski Vinstraflokkurin, nú boragarligu flokkarnir í Norra eru samdir um ikki at fara undir oljuleiting í norska partinum av Jan Mayen økinum. Vinstra ætlar saman við KRF at arbeiða miðvíst fyri at steðga oljuboringum út fyri Jan Mayen, báðurmegin markið tvs. eisini í íslendskum øki.

Sambært avtalu frá 1981 eigur Norra 25 av inntøkum frá oljuleiting í íslendskum øki við Jan Mayen og øvugt. Orkutalsmaðurin hjá KRF sigur við aftenbladen.no, at flokkurin var ímóti uppskotinum fyrr í ár um, at norski staturin skuldi brúka síni rættindi á íslendska landgrunninum, nakað, sum táverandi stjórnin gekk inn fyri.

“Um KRF hevði rátt fyri borgum, so var hetta loyvið ikki givið sigur talsmaðurin.” Hóast KRF ikki er við í komandi stjórn, so hevur hann saman við Vinstra tryggjað sær, at eingin leiting verður við eitt nú Jan Mayen komandi fýra árini.
Ì januar var oljumálaráðharrin og umboð fyri almenna oljufelagið Petoro í Íslandi fyri at skriva undir avtalu um norska luttøku í tveimum loyvum á íslendska landgrunninum.
Hetta var so mikið stór løta fyri íslendska oljuleiting, at fleiri av teimum mest framstandandi politikarunum í Íslandi vóru við til hátíðarhaldið. Hetta var mett at vera startskotið til eitt framtíðar íslendskt oljuævintýr.
Útmeldingarnar frá norskari síðu vóru tá eisini, at Norra fór at lata upp fyri økjum á norskum øki við Jan Mayen, um somu tíð sum øki í syðra og eystara partinum av Barentshavinum vórðu latin upp.
Bæði londini hava síðani arbeitt saman um at savna seismikk.
Tað stendur nú greitt, at Ísland missir ein samstarvsfelaga, nú norska stjórin fer at steðga øllum ætlanum at lata upp fyri leiting við Jan Mayen og kann harvið missa møguleikan at fáa atgongd til milliardainntøkur frá oljuboring á norskum øki við Jan Mayen. Hetta skrivaði Aftenbladet í vikuni.

Sambært blaðnum kann norska felagið Petoro, sum er við í tveimum íslendskum loyvum, taka seg úr teimum aftur innan tvey og fýra ár stendur í avtaluni.
Í avtaluni stendur, at norska felagið bindur seg til at vera við til at savna inn og skjóta seismikk. Málið skal so fyri aftur norskar myndugleikar, áðrenn avgerð verður tikin um at vera við til at bora.

“Vit fara ikki at gera viðmerkingar til, hvat nýggja stjórnin fer at gera, men vit arbeiða víðari í teimum báðum loyvunum vit eru partur av á íslendska landgrunninum. Avgerðin um ikki at loyva leiting á norskum øki ávirkar ikki okkara arbeiði í løtuni,” sigur Sveinung Sletten, kunningarstjóri i Petoro.

“Her er talan um eina gjørda avtalu, har vit í fyrsta umfari tulka gamlan seismikk. Tað er torført at siga nakað um komandi boring í økinum. Umboð fyri umhvørvisfelagsskapir og borgarligu flokkarnar eru sera fegin um avgerðina ikki at loyva leiting við Jan Mayen. Víst verður á, at økið við Jan Mayen er at meta sum eitt nátúrreservat, har einki oljuvirksemi eigur at vera. Oljuvinnan hevur sum so heldur ikki víst seg so øgiligan áhuga fyri at leita her verður sagt. Hetta er meira eitt ynski hjá vinstravendu stjórnini.

Keldur vilja vera við, at tað er norska Stórtingið, sum ger av, um virksemi kann vera frá norskari síðu eisini, tá avgerð skal takast um komandi boring.

Terje Hagevang, nevndarlimur ðí íslenska oljufelagnum, Eykon Energy, segði við norska blaðið í vikuni, at eingir umhvørvistrupulleikar eru í samsarbeiðaøkinum við Ísland.

NORSKEHAVET
Lofotbassenget
Røstbassenget
Vøringplatået